Starvslýsing

Heimatænastan

## Økisterapeutur til Heimatænastuna í Suðuroy

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir økisterapeuti 32 tímar um vikuna frá 1. august 2008 til 15. mars 2009.

Økisterapeuturin skal veita tænastu til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika. Tænastan verður veitt til vaksin yvir 18 ár, ið búgva heima ella á eldrasambýlum

**Vit sóknast eftir einum ergo-og/ella fysioterapeuti, sum**

. hevur arbeiðsroyndir
. hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
. dugir væl at samskifta við brúkarar og avvarðandi

**Vit bjóða**

. eitt starv við møguleika fyri at skipa og menna starvsinnihaldið
. eitt mennandi umhvørvi við møguleika fyri førleikamenning.

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Økisterapeuturin verður løntur sambart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag við einaískoyti.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara á tlf. 373 907.

**Umsókn**
Umsókn við neyðugum prógvum og viðmælum skal sendast til:

Nærverkið
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari,
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 18. juli 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 360000, Faks 360001, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI



## FHS og HH staklærugreinar

Heysthálvan 2008

**FHS staklærugreinar:**

| | | |
|---|---|---|
| Føroyskt C | týsdag | 18.00–19.30 |
| Virkisbúskapur C | mikudag | 18.00–19.30 |
| Kunningartøkni C | mikudag | 19.30–21.00 |
| Marknaðarførsla C | mánadag | 18.00–19.30 |
| Samfelagslæra/ fiskivinna C | hósdag | 18.00–20.15 |

**HH staklærugreinar:**

| | | |
|---|---|---|
| Vinnulívsrættur C | mánadag | 19.30–21.00 |
| Virkisbúskapur B | týsdag | 18.00–20.15 |
| Støddfrøði B | hósdag | 18.00–20.15 |
| Sølubúskapur B | mikudag | 18.00–20.15 |

Undirvísingin byrjar í viku 36.
Próvtøkan verður í mai/juni 2009.

Innskrivingarseðil finnur tú á heimsíðu skúlans, www.fh.fo.

Umsóknarfreistin er 20. august 2008.

SENDISTOVAN

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.tsu.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Samskipari til øki 1, íð umfatar Suðurstreymoy

Stuðulstænastan er í støðugari menning, og sum liður í einum nýggjum leiðslubygnað skal ein samskipari setast. Starvið er eitt nýtt fulltíðarstarv og verður sett 01.09.2008.

Stuðulstænastan fevnur um Stuðulskipanina fyri vaksin og Deildina fyri sinnisveik. Uppgávunar hjá Stuðulskipanini fyri vaksin eru: fylgi, eftiransni, umsorgan og sosialpedagogisk hjálp til heimabúgvandi persónar yvur 18 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika. Í løtuni eru uml. 120 persónar, sum fáa stuðul.

Uppgávunar hjá Deildini fyri sinnisveik eru bústaðar- og virknistilboð til sinnisveik. Høvuðsendamálið er at stuðla persónum, so teir hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

**Førleikakrøv / Høvðusuppgávur**

- Tú hevur eina relevanta sosial- ella heilsufakliga bakgrund.
- Tú hevur fakligu leiðsluna av 15 – 20 stuðlum, íð eru settir í øki 1.
- Tú hevur dagligu ábyrgdina av einum nýggjum toymi, ið fer at arbeiða við ungum , ið skulu tillaga seg í samfelagnum, umframt stuðlum, ið ikki eru knýttir til toymið.
- Tú kanst byggja víðari á tað fakliga fundamentið í tøttum samstarvi við starvsfólkini.
- Tú dugir at fyrireika og menna tænastuna til borgaran.
- Tú hevur eftirlit av samstarvsavtalum millum borgaran og stuðulin.
- Málsviðgerð.

**Vit leita eftur einum samskipara, sum hevur hesar persónligir eginleikar:**

- Tú arbeiðir sjálvstøðugt og dugir væl at fyrisita.
- Tú dugir væl at samskifta, bæði munnliga og skrivliga.
- Tú dugir væl at samstarva.
- Tú ert týðulig/ur og torir at taka avgerðir.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt arbeiðspláss sum er í støðugari menning og við nógvum avbjóðingum.
Humor.
Supervision.

**Lønar- og setunartreytir**
Talan er um eitt fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Nærverkið hevur sent starvið til flokkingar.

Tann, íð settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Regin Johansen, Leiðara á telefon 360000 ella økisleiðaran Hermann Mortensen á telefon 360000.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvskjølum, viðmælum og C.V skal sendast til:

**Nærverkið**
Argjavegur 26
Stílað: Regin Johansen, leiðari fyri Stuðulstænastuna
160 Argir

**Umsóknarfreist: 21. juli 2008 kl. 12.00.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 360000, Faks 360001, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Tónaforlagid selur

**"WELTMEISTER" og "BUGARI ARMANDO" harmonikur**

**Bíligast í norðurlondum!!!**



**Spar 1000-vís av krónum. Ring 216087 og bestill.**

**Far á heimasíðuna www.simme.eu og hugna tær við prísunum.**

simme musikkhús

N. Finsensgøta 7-9 - Tlf. 11687 - Fax 16071 - Postboks 1046 - Tórshavn